# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

**Føðingar**

12. juni fingu Linda og Søren Olsen í Oslo ein son. Hann vigaði 3200 gr og var 51 cm langur.






Tann 9. juni fekk Rúna Maria ein lítlabeiggja, sum var 51 cm. langur og vigaði 3200 gr. Foreldrini eru Eyðfríð Í. Jacobsen og Finn Rúni Simonsen í Havn.

29. mai fingu Birita Petersen og Tórfinn S. Simonsen, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4125 gr.

3. juni fingu Herborg Petersen og Julian Hansen, Kaldbak, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 3300 gr.

8. juni fingu Ruth og Kári Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3450 gr.

9. juni fingu Rikke Berg Larsen og Jens Pauli Petersen, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3325 gr.

10. juni fekk Kari Ann Leonhardsen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3550 gr.

13. juni fingu Tina og Teitur Johannesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3600 gr.

13. juni fingu Lovinda og Tórhallur Halgaklett, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3100 gr.

13. juni fingu Eva M. og Niclas Holm, Runavík, eina dóttur. Hon var 47 cm long og vigaði 2400 gr.

13. juni fingu Judith og Jón Jacobsen, Eiði, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4400 gr.

14. juni fingu Karin Klakk og Hemming Thomasen, Viðareiði, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4300 gr.

14. juni fingu Henny Mortensen og Fróði Nolsøe, Sørvágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3350 gr.

14. juni fingu Brynhild Hellisdal og Heri Ellendersen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3550 gr.

15. juni fingu Linda og Janus Kannuberg, Vatnsoyrar, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3800 gr.

**Brúdleyp**

17. juni giftast Lív Petersen, Tórshavn og Benny F. Hansen, Norðoyri. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, eru hjartaliga vælkomin út á Norðoyri, 700 Klaksvík, kl. 17.30.

Leygardagin 17. juni kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni, Birita Dalsgaard Hansen, Saltangará og Martin Karl Olsen, Vágur. Veitslan verður í HB-húsinum fyri innbodnum.

Leygardagin 17. juni giftast Janus Larsen av Argjum og Karina Jonson, Herlev, í Sankt Andreas Kirke í Keypmannahavn.

**65 ár**

Í dag, 16. juni verður Karl Wolles, Tórshavn, 65 ár. Dagurin verður hildin heima sunnudagin 18. juni frá kl. 13.00-18.00.

# Popplegenda rundar tey 40

Terji Rasmussen er ein legenda í føroyska tónleikaheiminum. Eins og bretar bert hava ein Robbie Williams, so koma føroyingar bara at eiga ein Terja Rasmussen. Eingin er sum Terji. Hann er bara, sum hann er, og tað kann vera trupult at greiða frá, hvussu hann er, og hví hann er soleiðis.

Hann er havnamaðurin, sum dugir framúr væl at skriva og framføra poppsangir. Hann kann saktans finna upp á at rýma av einari konsert, áðrenn hon er liðug. Hon torir væl at biða áhoyrararnar halda kjaft, so at hann fær spælt í frið. Men hann er eisini maðurin, sum gevur seg hundrað prosent hvørjaferð. Og tað hevur hann gjørt í meira enn 25 ár. Pallurin er hansara frístaður, hansara beinleiðis samband til sínar mongu fjepparar, og hevur tú einaferð upplivað Terja á palli, so veitst tú, at hann er nakað serstakt.

Hann er meira enn ein einstáttaður handverkari - hann er ein undirhaldari, ein sangari, sangskrivari og ósamanberiligur entertainari.

Terji er ikki bara framúr á palli, hann hevur eisini avrikað nakrar av størstu poppsangunum í Føroya søgu. Hvør kennir ikki sangir sum Eros, Nummar, Eg flýggi til tónleikin og allar sangirnar av tiltiknu útgávuni hjá Terja og Føstufressum. Hann hevur ferð eftir ferð rakt seymin á høvdið við sínum framúr góðu poppkompositiónum, og hann megnar framvegis at skriva fangandi sangir.

Sum menniskjað og vinur er Terji fantastiskur. Hann kann verða pínliga erligur, men hann er eisini trúfastur, positivur og dugnaligur í øllum tí, hann fæst við.

Seinnu árini hevur Terji búð í Nólsoy, og tað hevur undrað mangan, hví so er. Ferð eftir ferð hevur Terji fingið spurningin: Hví býrt tú í Nólsoy?



Kanska er tað sangurin Eg flýggi til tónleikin, sum hevur havt sína ávirkan á hann. Terji hevur ongantíð verið eitt býarmenniskja, sum hann hevur verið við til at læsa náttklubbarnar í Havn. Hann trívist best millum fá og góð fólk. Í Nólsoy hevur Terji funnið henda friðin og frælsið. Ikki tí at hann bara situr inni í Nólsoy, onkran túrin er hann niðri í Kaffistovuni, og tað kemur meir enn so fyri, at hann syngur nakrar sangir. Og mangan er tað hugnaligt, tá ið Terji situr og syngur har.

Fyri 14 døgum síðani aftaná Asfalt konsertina, møtti eg nøkrum hvalbingum uttan fyri Miðlahúsið. Teir greiddu frá, at teir høvdu havt sítt lívs upplivilsi í kaffistovuni í Nólsoy, teir høvdu fingið Terja at spæla allar sínar slagarar. Og tað var nógv betur enn at ganga í Havn og mala á Asfalt, søgdu teir.

Seinastu árini hevur tað ikki sørt av mótgangi verið ímóti Terja Rasmussen sum tónleikara. Serliga hava tað verið ummælarnir á bløðunum, ungu tónleikarnir og festivalarnir, sum hava funnist at honum. Eg veit, at nógv av tí, sum hevur verið skrivað, hevur Terji ikki verið glaður fyri, ikki tí at hann ikki tolir kritikk, men av at tað hevur verið skeivt, sum hevur verið skrivað. Millum annað skrivaði eitt av bløðunum um Ólavsøkukonsertina, at tá ið Terji fór á pallin, vóru nógvir áhoyrarar rýmdir, og tá ið hann var komin á pallin rýmdi restin. Undirritaði var har, og hetta passar ikki. Seinsta summar varð Terji noktaður backstage til ein av festivalinum, grundin skuldi verða, at hann ikki hevði spælt, var sagt. Mundi sanleikin ikki verða, at hann óynsktur har.

Prix Føroyar tónleikakappingin gav honum eisini nakrar snuddir. Aðrastaðni í heiminum fáa tónleikarar, sum hava avrikað so nógv sum Terji Rasmussen, stóra virðing frá teimum yngru. Men soleiðis er ikki allastaðni í Føroyum. Heldur mátti Terji standa fyri skotum, tá ið øvundsjúkir ummælarar og tónleikarar loystu av ímóti honum. Kallaðu hann ein handverkara – eitt tað størsta poppskaldið í Føroyum nakrantíð. Nei, nógvir av hesum kundi lært nógv av Terja og hansara tónleikaligu avrikum á útgávum og palli.

Á Summar Festivalinum í fjør hevði Terji sína lívs framførslu saman við Eyðuni Nolsøe, sum hann hevur spælt nógv saman við gjøgnum ár og dag. Onkur tónleikakønur vildi verða við, at hatta helst var besta konsertin á Summarfestivalinum. Tað var eisini tað, sum teir kønu ummælararnir hildu backstage, men ikki eitt orð kom á prent um framførsluna. Tað kunnu vit bara gita okkum orsøkina til.

Nei, Terji Rasmussen gevur ikki upp aftan á nógvan kritikk, hann er aftur farin í holt við at gera nýggjan tónleik. Hann hevur samlað sær teir gomlu Frensarnar saman aftur, og vit eru mong, sum gleða okkum til, at hann skal koma við einari nýggjari fløgu.

Tá ein er 40 ár, halda summi, at ein er gamal. Tað heldur Terji sgu ikki. Hann er framvegis sprelllivandi, fullur av orku, og hann ætlar sær at halda fram við at undirhalda fólki við sínum tónleiki. Leygarkvøldið verður so ivaleyst aldarinnar veitsla í Nólsoy, har fólk úr øllum landinum fara at hátíðarhalda 40 ára dagin hjá Terja Rasmussen. Hav eina góða veitslu og nógv góð ár framyvir

**Jonhard**

**Dagurin**

**17. juni. Bótolvsøka ella bótolvsmessa.** Munkurin Botolphus stovnaði kleystur í Lincolnshire í Onglandi, og býurin Boston eitur eftir honum. Hann doyði umleið ár 680. Navnið Bótolvur ella Bótal hevur verið brúkt sum mansnavn í Føroyum og kemur fyri bæði í samband við jørð og útróðrarmið.

**18. juni. Leontius**, deyður umleið ár 135. Heryvirmaður í rómverska herinum, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.

**19. juni. Gervasius**, deyður umleið ár 300. Gervasius og bróðirin Protasius vórðu tiknir av døgum í Milano.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum mintust okkum á gullbrúdleypsdegi okkara, tann 9. juni 2006 við gávum, telegrammum og uppringjan, men mest verða tit, børn og svigarbørn takkað, fyri at tit gjørdu okkum dagin so hugnaligan.

**Blíðar heilsanir**
**Sunneva og Ásgrímur Debes**